**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísraelsk mina drap fimm skúlabørn

**Einstakir ráðharrar og partar av ísraelsku herleiðsluni krevja, at málið skal kannast til botns**

ÚTLAND

Tað var ikki ein óbrostin granat, sum tey fimm palestinsku skúlabørnini komu framá hósdagin, men heldur ein sokallað "lúrimina". Tey fimm skúlabørnini, sum øll búðu í Gaza, vóru millum seks og fjúrtan ára gomul.

Upprunaliga ljóðaði, at tey fimm børnini høvdu funnið eina óbrostna ísraelska granat, sum tey síðani vóru farin at spæla við, men ísraelska blaðið Maariv avdúkaði í gjár, at talan var ikki um eina granat, men eina minu. Blaðið veit eisini at siga, at ísraelskir agentar løgdu minuna herfyri. Ætlanin var, at hon skuldi beina fyri víðgongdum palestinum, sum hildu til har, og sum høvdu skotið eftir ísraelskum hernaðarmálum.

Ísraelska útvarpið segði í gjár, at kreftir í herleiðsluni høvdu kravt, at tilburðurin skuldi kannast, og Ephaim Smeh, flutningsmálaráðharri, sum var varaverjumálaráðharri í undanfarnu stjórnini, segði við útvarpið, at málið skal kannast.

- At fimm børn doyggja á hendan hátt eiga vit at taka í størsta álvara. Málið má kannast, og herleiðslan eigur at lata okkum eina frágreiðing um hetta, segði ráðharrin.

### Skeiv frágreiðing

Andstøðuleiðarin í ísraelska tjóðartinginum skuldsetti í gjár herleiðsluna fyri at skáka sær undan ábyrgd við at siga, at herurin hevði ikki skotið granatir inn í Gaza hósdagin.

Tann fyrsta frágreiðingin hjá herleiðsluni var, at tey fimm børnini vóru komin fram á eina óbrostna granat, tá tey vóru á veg í skúla. Sagt varð, at børnini koyrdu undir granatina, sum alt fyri eitt sprongdist. Tey fimm børnini fóru so illa, at tey vóru ikki til at kenna aftur. Tey fóru til gravar í gjár.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at stríðið millum ísraelsmenn og palestinar hevur kostað palestinskum børnum lívið.

Tann syndarligi tilburðurin í Gaza hósdagin hendi, júst sum George W. Bush, forseti og Colin Powell, uttanríkisráðharri hava lagt trýst á ísraelsmenn og palestinar fyri at fáa enda á ófriðinum. Tað er einki at ivast í, at tilburðurin í Gaza fer at herða amerikanska kravið um frið.



*Mynd: Reuter*

Fyribils er úrslitið, at Ariel Sharon, forsætisráðharri hevur játtað at hitta Bush forseta.

**(Fartekst)**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu tá ið

**Páll Poulsen**
Tórshavn

doyði og varð jarðaður, takka vit hjartaliga.

**Fríðbjørg, Fríðmundur og systkin við familju**

# ES og Noreg ósamd um fiskirættindi

**Noreg og ES kunnu ikki einanst um kvoturnar í Norðsjónum**

ÚTLAND

Ætlanin var at enda samráðingarnar í gjár, men fyribils hava partarnir avtalað at útseta samráðingarnar til tann 13. desember.

Ósemjan snýr seg um, hvussu svartkjafturin skal umsitast, og júst svartkjafturin hevur stóran týdning sum býtisfiskur millum Noreg og ES. Tá talan er um tað, sum Noreg fær í býti við ES, svarar svartkjafturin til 40 prosent.

Undan samráðingunum varð roknað við, at toskaveiðan fór at verða tann stóri stríðsspurningurin, tí Noreg hevur skotið upp at avmarka toskaveiðuna í Norðsjónum niður í lítið og einki.

Í gjár vildi norski samráðingarleiðarin, Sigrun Holst, ikki siga, hvussu samráðingarnar høvdu gingið. Hon segði bert, at partarnir vóru samdir um okkurt.

Hóast Noreg og ES umsita fiskiskapin í Norðsjónum í felag, hevur hesin fiskiskapurin munandi størri búskaparligan týdning fyri ES-londini.

**(Fartekst)**


## Starvsfólk til KT-deildina á Føroya Tele

"Vísir menn gera orðatøk, men býttlingar endurtaka tey"
Samuel Palmer



Føroya Tele hevur seinastu árini støðugt víðkað um talið av tænastum, sum vit bjóða kundum okkara. Tað hevur ført við sær stóran vøkstur í fjølbroytninum av uppgávunum á KT-deild okkara. Ein vøkstur, sum vit vænta heldur fram komandi árini.

Fyri framhaldandi at kunna avgreiða uppgávurnar á besta hátt, søkja vit tí eftir einum nýggjum starvsfólki til KT-deildina.

KT-deildin tekur sær av innanhýsis kunningartøkni á Føroya Tele. Tað vil m.a. siga uppseting, viðlíkahald, support og feilrætting av stórum UNIX-servarum, Oracle dátugrunnum og applikatiónum, filuservarum, egintelduneti og mangum øðrum.

**KT-deildin tekur sær eisini av**
- stýring av verkætlanum
- innkeypi av tól- og ritbúnaði
- útvikling, menning og tillaging í samband við edv-búnað o.a., sum Føroya Tele nýtir innanhýsis og/ella letur kundunum

Eisini er KT-deildin við í menningini av framtíðar strategiarbeiði í Føroya Tele, eins og deildin er miðdepil í arbeiðnum við at finna og seta í verk bestu arbeiðshættirnar í fyritøkuni.

Starvsfólkið, sum vit søkja eftir, skal hava viðkomandi útbúgving sum verkfrøðingur, datalogur, cand. merc. dat. ella líknandi. Viðkomandi skal hava góðar menniskjansligar eginleikar og kunna vera við í verkætlanararbeiði.

**Royndir við einum ella fleiri av fylgjandi er ein fyrimunur:**
- Verkætlanarstýring
- Dátugrunnum (Oracle), Dba, tuning v.m.
- Fjarskiftisvinnu
- Oracle útviklingstólum
- UNIX-skipanum
- PL/SQL
- Búskapartrøði og arbeiðshættum
- Java, Web-tøknifrøði

Nýútbúgvin eru eisini sera vælkomin at søkja.

Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Starvið er lønt sambært sáttmála hjá avvarðandi yrkisfelag.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Michael Thomsen, deildarleiðara, ella Starvsfólkadeildina á tlf. 303030.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum og ummælum, skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 10. desember 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av megnpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt, og hetta setur stór krav til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*





